**Uppskot**
**til**
**samtyktar**

**um, at landsstýrið beinanveg skipar eitt búskaparligt vakstrarforum.**

## Viðmerkingar

Ein samskipað og málrættað vakstrartilgongd

Føroysk fiskivinna hevur tørv á bygnaðarbroytingum og effektiviseringum. Endmálið er at skapa vøkstur og virðisøking í fiskivinnuni, so lønsemið kann gerast betri og ráð verða til nýíløgur. Ein sera umráðandi partur av broytingunum er, at alt tilfeingið í sjónum kemur upp á land til tilvirkingar í Føroyum, og at landsstýrið fer til verka fyri at útvega føroyskum fyritøkum nógv betri marknaðaratgongd fyri tilvirkaðar vørur – matvørur – til ES.

Ein røð av álitum og frágreiðingum er skrivað í fakligum arbeiðsbólkum, sum mæla til broytingar, ið kunnu skapa vøkstur. Samstundis eru hugskot og loysnir í vinnuni um menning og vøkstur. Trupulleikin er tó, at vantandi samskifti millum aktørar í vinnuni, politisku skipanini og fakfeløgum forðar fyri, at góðu tiltøkini og hugskotini verða sett í verk.

Tí vil Sambandsflokkurin, at neyðugu fyrstu stigini verða tikin til, at eitt breitt samstarv millum politisku skipanina, vinnuna og fakfeløg verður skipað. Arbeiðast skal við at kveikja vinnuligan vøkstur og avleiddan búskaparvøkstur, sum kemur øllum samfelagnum til góðar.

Málið er at skipa eitt vinnupolitiskt vakstrarforum, ið kann seta mál, leggja vinnustrategi, skapa vinnukarmar og virka fyri fríari atgongd til ES-marknaðin. Hetta vakstrarforum eigur at virka fyri kappingarføri, hægri útflutningsvirði, størri virðisøking, lønsomum rakstri og at tryggja verandi og skapa nýggj arbeiðspláss.

Vakstrarmøguleikar eru góðir júst nú við meirtilvirking í høvuðsvinnuni, har veiðinøgdirnar eru munandi øktar seinnu árini, og bert ein sera lítil partur verður tilvirkaður.

Meginparturin av rávøruni fer framvegis sum hálvfabrikata av landinum at virka til matvørur, og harvið missir føroyska samfelagið milliardir av krónum í útflutningsvirði. Tann støðan má og skal vendast, so samfelagskøkan kann vaksa til fyrimuns fyri øll í Føroyum.

Føroyar eru í kapping við umheimin hvønn dag um mest týðandi tilfeingið, ið er fólkið. Skulu føroyingar trívast og mennast, er neyðugt, at avbjóðandi størv eru til taks, bæði til ófaklærd, faklærd og fólk við hægri útbúgvingum. Eisini er sera umráðandi, at føroyska væferðarsamfelagið er fult á hædd við tað, ið grannalond kunnu bjóða.

Nýggjar avbjóðingar og eitt sterkari vælferðarsamfelag kunnu skapast við at økja virðið á tilfeinginum við at framleiða og selja matvørur heldur enn rávørur.

Fyriskipan av vinnupolitiskum vakstrarforum

Fyri at tryggja eitt vælvirkandi vakstrarforum, er neyðugt, at vinnulig sjónarmið og politisk sjónarmið sameinast, soleiðis at eitt konstruktivt orðaskifti tekur seg upp við tí endamáli at skapa framburð, vøkstur og vælferð í samfelagnum.

Tí skal hetta vakstrarformum hittast nakrar ferðir árliga fyri at taka til viðgerðar vakstrarfremjandi viðurskifti.

Vakstrarforumið skal samstundis kunna seta fokusbólkar við serligum atliti til ávísar vinnuligar eindir, t.d. fiskivinnuna, alivinnuna, ferðavinnuna o.a. Fokusbólkarnir skulu t.d. viðgera serlig viðurskifti innan ávísu økini og mæla til ítøkilig vakstrartiltøk, ið síðani skulu setast í verk.

Mest umráðandi er, at vegurin frá hugskoti til handling er stuttur.

Átroðkandi samfelagsligar loysnir

Sambandsflokkurin heldur tað vera átroðkandi neyðugt at taka neyðugu stigini júst nú, tí álvarsligir haldføristrupulleikar eru í samfelagnum, og stórur tørvur er á bygnaðar-broytingum, bæði innan tað almenna og vinnuna.

Allir politiskir flokkar á Tingið eiga at hava áhuga fyri at fremja nýskipanir og betringar, ið varðveita verandi lønsomu arbeiðspláss og kunnu skapa nýggj lønsom og kappingar-før arbeiðspláss.

Partur av einum vinnuligum vakstrarpakka

Henda løgtingssamtykt, sum Sambandsflokkurin leggur fram, um at skipa eitt búskaparligt vakstrarforum er partur av einum vakstrarpakka, ið hevur til endamáls at betra vinnukarmarnar fyri okkara høvuðsvinnur umframt at beina burtur avmarkingar og forðingar fyri útflutningsvinnuna.

**Á Løgtingi tann 29. februar 2016**

**Sambandsflokkurin**

Bárður S. Nielsen, Magni Laksáfoss, Magnus Rasmussen, Edmund Joensen,
Kaj Leo Holm Johannesen og Bjørn Kalsø